Erhard Joensen
Uni Rasmussen
Bill Justinussen
Helgi Abrahamsen
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 19/2021: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri oktober 2021

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 11 Heilsumál

B. Játtanir

		Útreiðslur	Inntøkur
11.20.3. Sjúkrahúsverkið v.m.			
04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarj.)	J	804.857	-
	EYJ	**52.790**	**-**

Viðmerkingar:

Til 2. viðgerð varð eykajáttanin á hesi høvuðskontu eftir broytingaruppskotinum í álitinum hjá meirilutanum í Fíggjarnevndini økt við 7.370 tús. kr., úr 33.420 tús. kr. upp í 40.790 tús. kr. Av teimum 7.370 tús. kr. vórðu 6.000 tús. kr. til koronukanningar, 600 tús. kr. til at bjóða ávísum borgarum 3. koppseting og 770 tús. kr. til at hava fyribils koronudeildina virkna árið út.

Við hesum broytingaruppskoti verður mælt til at hækka eykajáttanina við 12.000 tús. kr. afturat, soleiðis at eykajáttanin á høvuðskontuni hækkar úr 40.790 tús. kr. upp í 52.790 tús. kr. Tær 12.000 tús. kr. eru til koronukanningar seinna hálvár hjá Landssjúkrahúsinum at standa fyri.

Á fíggjarlógini fyri 2021 vórðu játtaðar 8.970 tús. kr. til Landssjúkrahúsið til koronukanningar í 3 mánaðir. Í eykajáttan fyri apríl 2021 vórðu játtaðar aðrar 6 mió. kr. til endamálið í 3 mánaðir afturat. Í hesum eykajáttanaruppskoti fyri oktober 2021 verður biðið um 12 mió. kr. til endamálið fyri seinna hálvár, men við samtykta broytingaruppskotinum til 2. viðgerð varð eykajáttanin til endamálið hækkað við 6 mió. kr. til 18 mió. kr. Við hesum broytingaruppskoti til 3. viðgerð verður eykajáttanin til endamálið hækkað við øðrum 12 mió. kr., so eykajáttanin til koronukanningar fyri seinna hálvár verður 30 mió. kr. til Landssjúkrahúsið at standa fyri.

Fyri fíggjarárið 2021 verða sostatt samanlagt játtaðar 44.970 tús. kr. til koronukanningar hjá Landssjúkrahúsinum at standa fyri.

Harumframt eru til koronukanningar á Klaksvíkar sjúkrahúsi játtaðar 450 tús. kr. fyri fyrra hálvár umframt 900 tús. kr. í hesum eykajáttanaruppskoti fyri seinna hálvár; til koronukanningar á Suðuroyar Sjúkrahúsi eru játtaðar 390 tús. kr. fyri fyrra hálvár umframt 282 tús. kr. í hesum eykajáttanaruppskoti fyri seinna hálvár.

Koronukanningarnar eru kostnaðarmiklar, og tí er tað av stórum týdningi, at kanningarvirksemið verður avmarkað til einans neyðugar kanningar. Til tess at forða fyri, at óneyðugar kanningar verða gjørdar í sjúkrahúsverkinum og fyri at avmarka útreiðslur landskassans í hesum sambandi, verður heitt á landsstýrismanninum í heilsumálum at skipa soleiðis fyri, at ein greið vegleiðing verður gjørd um, nær tað er neyðugt at lata seg kanna.

Á Løgtingi, 25. november 2021

Erhard Joensen Uni Rasmussen

Bill Justinussen Helgi Abrahamsen